

*Til gaman og álvara:*

# Óli P. á lands-stýrisfundi

*Heykar og dúgvur*



– *Eg vtki ikki ein tommy!*

**Meðan partar av fólkaflokkinum vilja reka konfrontationspolitikk í Tinganesi, eru aðrir fyri einum meira hovligum samarbeiðshatti við javnaðarflokkin**

*Hóast landsstýrisfundirnir í hesum døgum ikki júst bera bráð av sátt og sóma og gleði, so eru tó stundir til at stuttleika sær sum hesa løtuna stutt undan landsstýrisfundinum í vikuni, har teir báðir landsstýrismenninir Svend Åge Ellefsen og John Petersen ikki kunnu lata vera við at fáa brosið fram, tá teir sóu seg sjálvar og Jógvan Sundstein á vanligu tekningini hjá Óla P. Mynd kalmar*

# Olja og undirgrundin viðgerast í kreppunevnd

Síðani rættindini í undirgrundini vóru yvirtøkin av føroyingum hevur verið ósemja í landsstýrinum um, hvør skal umsita møguliga olju í undirgrundini sum málsøki.

Svend Åge Ellefse, landsstýrismaður boðaði nú um dagarnar frá í útvarpinum, at varð ikki ein avgerð tikin skjótt um henda spurning, so fór tolið hjá fólkafloksmonnum í landsstýrinum skjótt at vera uppi. Hetta saman við øðrum óloystum málum kundi so føra til samgonguslit.

Sosialurin hevur tingið upplýst, at málið í løtuni liggur til viðgerðar í teirri kreppunevdnini, sum samgongan setti fyri tveimum árum síðani at viðgera mál, sum ósemja var um.

## Ósemjur

Í samgonguskjalinum stendur, at har flokkarnir ikki eru samdir um ávís mál, har skulu tey leggjast fyri eina ávísa kreppunevnd. Í henni eru løgmaður, varaløgmaður og formenninir í tingbólkunum.

Málið um undirgrundina hevur stungið seg upp rættuliga óvantað.

Nú undirgrundin er yvirtikin halda fólkafloksmenn, at hon hoyrir undir málsøkið hjá orkumálaráðharranum Svend Åge Ellefsen. Hetta um somu tíð sum landsstýrismaðurin í ídnaðarmálum hevur víst stóran áhuga fyri útbúgving og ídnaði á økinum.

Marita Petersen, løgmaður, sum framvegis umsitur hetta málsøkið, hevur sagt, at eingin avgerð verður tikin í málinum fyrr enn olju-nevdnin er komin við síni frágreiðing í juni.

Síðani er tað hent, at málið hevur verið fyri á landsstýrisfundi, og har eru flokkarnir ikki samdir. Tað er tí farið í kreppunevndina.

Kortini rumblar Svend Åge Ellefsen við málinum og herfyri varð hann í fjølmiðlunum og hótti við samgonguslit, fekst ikki ein loysn á málinum. Tvs. ein loysn sum miðajr móti, at hann sjálvur skal umsita ein stóran part av málinum, meðan aðrir partar av undirgrundarmálinum verða umsitnir av øðrum landsstýrismonnum, alt eftir um talan er um ídnað, fígging, lógir osfr.

Anfinn Kalsberg, umboð hjá fólkaflokkinum í kreppunevndini sigur, at eingin orsøk er til at rumbla við hesum málinum. Tað fær sína nátúrligu viðgerð í kreppunevndini.

jan

**Tøkk**

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg á 80 ára degnum.

*Við heilsan*
**Hanus við Høgadalsá**

**BMV 525 i**
frá aug./92, sum spildurnýggjur – og ein

**Mazda 626 2000**
frá aug./92 – til sølu.
Fígging kann útvegast.

Tlf. 32877 - 32411

**NATURAL SEA BEAUTY**

Kosmetikkrøðin við mineralum úr Deyðahavinum er at fáa.

Brosjurur fáast við at ringja tlf. 12148.

**HANS HANSEN**
Djúpagilsvegur 34
FR-188 Hoyvík